# Ábyrgdarloysi og ideologiskt bluff

JASPUR
VANG
løgtingsmaður



**Hettar var niðurstøðan á Løgtingi seinasta fríggjadag, tá skerjingar av ríkisveitingini enn einaferð vóru til viðgerðar.**

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum svaraði á Løgtingi seinasta fríggjadag skrivligum fyrispurningi frá undirritaða, sum hevði heitt á landsstýrismannin um seta neyv tøl á avleiðingarnar av seinastu skerjingini í ríkisveitingini. Í hesum sambandi vórðu eisini tær fortreytir, framskrivingar og meting-ar, sum vórðu lagdar til grund fyri at skerja og fastfrysta ríkisveitingina, eftirmettar.

**Landskassin hevur mist 3,8 milliardir krónur**
Fíggjarmálaráðið hevur roknað seg fram til, at við renturs rentu hevur skerjingin og fastfrystingina av ríkisveitingini seinastu 6 árini samanlagt kostað landskassanum 3,8 milliardir krónur. Hettar er fyrstu ferð, at almennur føroyskur myndugleiki hevur sett neyv tøl á hesa dáragerð, sum sonevnda fullveldissamgongan framdi av ideologiskum ávum eina.

**Landskassin missir í ár 579,5 milliónir krónur**
Eisini hevur Fíggjarmálaráðið roknað seg fram til, at varð ríkisveitingin ikki skerd og fastfryst frá 2002 at rokna, hevði veitingin og harvið inntøkurnar hjá landskassanum verið 579,5 milliónir hægri í 2009 og tey komandi árini, enn tær verða. Sostatt er hesin árligi missur áleið á hædd við væntaða hallið á fíggjarlógini fyri inniverandi ár.

**Fullveldissamgongan sveik síni egnu lyftir**
Tá fullveldissamgongan gjørdi av at skerja og fastfrysta ríkisveitingina, var tað ein avgjørd fortreyt, at tað skuldi rekast ein skynsamur fíggjarpolitikkur, soleiðis at rakstrarútreiðslur landskassans ikki hækkaðu meira, enn vøksturin í búskapinum sum heild.

Staðfest varð í Løgtinginum fríggjadagin, at fullveldissamgongan als ikki tók stig til at tillaga fíggjarligu viðurskifti landskassans samsvarandi niðurskurðinum í ríkisveitingini. Tvørtur ímóti, so loyvdi fullveldissamgongan rakstrarútreiðslum landskassans at hækka munandi, árini eftir at ríkis-veitingin varð skerd. Mett hevur verið, at rakstarútreiðslur landskassans hækkaðu uml. 1 milliard krónur, tey árini fullveldissamgongan sat við valdið.

Av tí at føroyski búskapurin hevði viðrák árini eftir skerjingina, merktu vit tó ikki so nógv til niðurskurðin og fastfrystingina fyrstu tíðini. Tað er tó givið, at skerjingin og stóru útreiðsluhækkingarnar, saman við afturvendandi skattalættum, eru orsøk til, at tað er munnandi verri at fáa avlop á fíggjarlógini, nú tíðirnar eru versnaðar.

**Frá spádómum og ynskidreymum til veruleika**
Táverandi løgmaður, Anfinn Kallsberg, greiddi 6. apríl 2001 Løgtinginum frá, at hann væntaði munandi vøkstur í føroyska búskapinum orsakað av oljuleitingarvirksemi, eins og Anfinn Kallsberg tá metti inntøkurnar frá oljuleitingarvirkseminum nærum púra vissar.

Fíggjarmálaráðið hevur roknað út, at inntøkurnar frá oljuleitingarvirksemi seinastu 8 árini hava verið góðar 90 mió. kr. Frá hesari upphædd skulu so dragast tær útreiðslur, almennu Føroyar hava havt av m.a. kolvetnisumsiting, oljumálaráð og útbjóðingum av boriloyvum. Hesar útreiðslur eru uttan iva hægri enn inntøkurnar av oljuleitingarvirkseminum.

Sostatt kann staðfestast, at nærum púra vissu oljuinntøkurnar, sum táverandi løgmaður spáddi, eru vorðnar til faktiskar meirútreiðslur.

**Ábyrgdarloysi og politiskt bluff**
Ein inntøkumissur uppá samanlagt 3,8 milliardir krónur eftir bert 6 árum, umframt ein árligur inntøkumissur uppá 579,5 milliónir krónur komandi nógvu árini, framdur av idiologiskum ávum eina, samstundis sum rakstrarútreiðslur landskassan vórðu øktar munandi, kann ikki sigast vera annað enn ábyrgdarloysi út um alt mark.

At fullveldissamgongan við táverandi løgmanni á odda, samstundis royndi at billa føroyingum inn, at inntøkur frá oljuleitingarvirksemi fóru at skapa búskaparvøkstur, og at hesar inntøkur vóru nærum púra vissar, var púra ábyrgdarleyst og ikki annað enn politiskt bluff.

**Ábyrgdarloysið má steðga**
Ein kann so spyrja, hví tað er neyðugt, framhaldandi at viðgera niðurskurðin og fastfrystingina av ríkisveitningini. Til hettar er at siga, at tað eins og í øllum lívsins viðurskiftum, eisini í politikki, er neyðugt at eftirmeta avleiðingarnar av tiknum avgerðum, soleiðis eisini avgerðina um at skerja og fastfrysta ríkisveitngina. Ein slík eftirmeting hevur sjálvsagt til endamáls, at vit taka við læru av gjørdum mistøkum.

Sjálvsstýrisflokkurin hevur í seinastuni lagt uppskot fram á Løgtingi um at skerja ríkisveitingina enn meira. Í hesari vikuni viðgerð Løgtingið harumframt uppskot frá Tjóðveldi um m.a. at avtaka sjómannafrádráttin og áleggja fiskivinnuni tilfeingisgjald, samstundis sum ríkisveitingin verður skerd enn meira.

Lat okkum vóna, at løgtingsmeirilutin hevur lært av seinastu skerjingini í ríkisveitingini, soleiðis at ábyrgdarleysa ideologiska bluffið frá loysingarvonginum í føroyskum politikki ikki eydnast enn einaferð.

# Nýtt røktarheim í Havn

EILIF
SAMUELSEN



Í hesum døgum verður ljós kastað á støðuna viðvíkjandi vantandi røktarheimsplássum serliga í Tórshavnar kommunu, og tað av góðum grundum, tí akutti tørvurin sigst vera á umleið hundrað nýggjum plássum.

Síðani Lágargarður var tikin í brúk í 1987, hevur kommunan útvegað fleiri pláss, mest í samband við yvirtøkuna av Marinustøðini og við byggingini av heiminum fyri minnisveik, men ásannast má, at tað hevur munað alt ov lítið higartil.

Gaman í hevur tann ivingarsama støðan, sum hevur valdað, tá ið talan hevur verið um ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, verið ørkymlandi, men nú er støðan greið: kommunurnar vita vita nú, at tað eru tær, sum hava ábyrgdina av at byggja røktarheim. Frá landinum fáa tær 800.000 kr. í studningsláni fyri hvørt búfólkið, og teir pengarnar útvegar landið so hvørt, hevur landsstýriskonan í almannamálum veitt trygd fyri. Raksturin ber landið 100 %. So tað er sostatt bara at fara í gongd.

Men støðan í dag er heilt serstaka akutt, og tí leitar kommunan eftir onkrum húsum, sum eru so mikið stór, at tað verður ein munandi hjálp í tí. Enn hevur einki verið at hoyrt um nakra loysn á málinum, og tá ið hugsað verður um, hvat ein slík neyðloysn við neyðugum umbyggingum fer at kosta, so verður minni munurin á at byggja nýtt. Og slíkar neyðloysnir vita vit av royndum eru nærum altíð ónøktandi sum frá líður.

Røktarheimið Mørkin í Streymnesi er tað seinasta, ið bygt er, og tað hevur roynst stak væl. Tað var skjótt at byggja, og prísurin var sámuligur.

**Hugskot til Heðin Mortensen**
Hvat við at taka samráðingar upp við arkitektin og Sunda kommunu um at sleppa at brúka somu tekningarnar til at byggja eitt ella tvey slík røktarheim í Havn. Tað hevði spart bæði eitt og tvey ár í fyrireikingum. Farið kundi verið í gongd beinan vegin, og heimið kundi verið tikið í brúk eftir minni enn tveimum árum. Við at gagnnýta ein so upplagdan møguleika hevði Tórshavnar kommuna fingið eina dygdargóða og varandi loysn á akuttu støðuni, sum allir borgarar í kommununi høvdu tikið undir við av fullum huga, og byggiprísurin hevði ligið væl innan fyri tað, sum kommunan er før fyri.

PS. Hevði kommunan lænt Herluf Joensen eina gravkúgv, so hevði hann grivið eisini hetta (hesi) grundstykkið út eftir fáum vikum

# Vesturheimurin deildur?

GUNNAR
ISFELD

'Heili' 23 lond av teimum 27 í ES standa saman um at vera ein partur av Durban II, rasismuráðstevnuni hjá ST, sum verður hildin hesar dagarnar. Men hesi 23 lond eru í fólkatali ein greiður minniluti í Vesturheiminum!

Ja um vit bert taka vestureuropeisku londini við her, so gerst hesin minnilutin enn minni.

Men hvat er Vesturheimurin ella hvørji eru Vesturlond? Hendan 'heim' mynda Europa (serliga Vestureuropa), USA, Kanada, Australia og Ný Sæland. Ein kundi eisini tikið Japan við vegna teirra politisku skipan, livifót o.t. Men hetta er eitt elligamalt asiatiskt land við egnari mentan, øðrvísi religión osfr. Eitt nú hevur tann virdi – hóast umstríddi – Samuel P. Huntington lýst Japan sum eina serstaka sivilisasjón. Ísrael kann eisini teljast uppí Vesturlond í flestum førum.

USA, Kanada, Australia, Ný Sæland og Ísrael hava øll boykottað Durban II og hesi lond hava uml. 370 milliónir íbúgvar. ES hevur uml. 490 mió.

Men ES-londini, Týskland, Pólland, Italia og Holland hava – eins og Ísrael og øll tey ikki-europeisku Vesturlondini (!) – valt at boykotta hesa rasismuráðstevnu. Hetta hevur við sær, at tey Vesturlond sum boykotta hesa ST-ráðstevnu umboða einar 570 mió. vesturlendingar, sum er ein sera greiður meiriluti. Tey 23 ES-londini sum luttaka umboða knappar 300 mió. fólk.

**Hetta er ikki lovandi**
Vesturheimurin, sum vanliga verður hildin at vera myndaður av rættiliga eins londum, tá hugt verður at grundleggjandi virðum og samfelagsskipanum: øll eru t.d. liberal demokratiir og kristin (uttan Ísrael); hesin heimur er altso rættiliga deildur í hesum virðispolitiska spurningi, sum verður viðgjørdur á hesari ST-ráðstevnu.

Vesturheimurin kann, sær tað út til, ikki standa saman um ein felags rasismu-politik, og heldur ikki kunnu vit í Vesturlondum standa saman um at luttaka á hesari ST-ráðstevnu, sum jú er at vísa ólýdni ella manglandi álit, trúgv uppá henda felagsskap av heimsins tjóðum, sum jú serliga er eitt barn av Vesturheiminum.

Leggjast kann afturat, at vit í Føroyum, sum partur av Danmark, hoyra til tann omanfyrinevnda minnilutan í Vesturheiminum.

Nú vil eg ikki koma nærri inn á, hví hesin meiriluti av Vesturheiminum hevur valt at boykotta, men tað er sjálvsagt, at um mann ikki luttekur, so kann mann heldur ikki vera við í teimum endaligu orðingunum, t.e. tí endaligu 'felags' ST-kósini í stríðnum móti rasismu í heiminum.

Um mann metir orsøkirnar til fráveruna hjá hesum boykottandi londum at vera í ordan, so má tó sigast, at hetta lovar ikki serliga væl, hvat framtíðar ST-samstarvi viðvíkur.

Eitt er so tað, at mann ikki stendur saman í ST, sum hóast alt í sjálvum sær ikki er tann stóra "breaking news", men sjálvur Vesturheimurin er, sum sagt, sera deildur í hesum føri – eins og vit vóru í avgerðini um innrásina í Irak – somuleiðis hesu meðin ár 2000.

Mann fær hug at spyrja:

Kenna Vesturlond seg ikki heilt heima í ST longur? Ella er Vesturheimurin bara vorðin meiri ósamdur í týðandi spurningum? Og hví er tann ikki-europeiski parturin av Vesturheiminum samdur um boykottið, meðan londini, sum skulu eitast at standa saman í ES ósamd?

Vit í Vesturheiminum og kanska serliga í Europa kunnu sjálvandi verja okkum við, at vit hava tolsemi og frælsi til at vera ósamd. Men er hetta ein haldbar støða í framtíðini í sambandi við virðispolitiskum grundarlagi og ST-samstarvi?

Eg loyvi mær at ivast.